www.oljan.fo

Jan Müller 20 - 11 - 2012

Løgmaður um Føroyar og Arktis - vitan og samskifti lyklaorð

"Sum løgmaður er tað mín fremsta uppgáva at tryggja best hugsandi karmar fyri okkara framtíð. Her eru vitan og samskifti lyklaorð", segði Kaj Leo Johannessen, løgmaður, tá hann setti verkstovu um Føroyar og Arktis - avbjóðingar og vinnumøguleikar. Hann helt fram - "Arktis er veruliga komið á dagsskránna seinnu árini. Vit hoyra dagliga um veðurlagsbroytingar. Tað er tó í Arktis, at veðurlagsbroytingarnar eru mest sjónligar og hava tær ógvusligastu fylgjurnar. ST hevur staðfest, at miðalhitin í arktiska økinum økist dupult so skjótt sum miðalhitin í restini av heiminum. Ísurin bráðnar. Og øki, sum fyrr vóru óatkomandi, eru nú um at verða latin upp fyri umheiminum. Hetta gevur nýggjar avbjóðingar og møguleikar. Møguleiki verður fyri nýggjum og styttri siglingarleiðum millum Atlantshavið og Kyrrahavið. Tað verður eisini gjørligt at gagnnýta náttúrutilfeingi, sum áður ikki var atkomuligt. Mett verður, at stórar mongdir av ráevnum eru í undirgrundini í arktiska havinum - bæði olja, gass og mineralir. Fleiri rópa varskó og vísa á vandan fyri dálking og øðrum skaðiligum árinum á viðbreknu arktisku náttúruna. Meðan onnur síggja stórar búskaparligar og vinnuligar møguleikar við broytingunum í Arktis. Føroyar liggja væl fyri á farleiðunum norður um Russland og Kanada. Hetta kann skapa gyltar møguleikar, nú skipaferðslan økist, og eftirspurningurin eftir vørum og tænastum veksur. Skulu vit tryggja okkum ágóða av økta virkseminum er neyðugt, at vit eru framskygd og til reiðar at lofta møguleikum og avbjóðingum. Vit mugu ikki liggja sjóvarfallið av okkum. Vit mugu tí vera virkin og gera tær neyðugu fyrireikingarnar. Tað krevur eina miðvísa ætlan, sum tekur allar viðkomandi partar í samfelagnum við. Føroya landsstýri er í gongd við at gera eina ætlan fyri, hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av virkseminum, sum longu nú fer fram í arktiska økinum. Eisini fevnir ætlanin um, hvussu vit verja okkum

móti árinunum av øktu ferðsluni í føroyskum sjóøkið. Harafturat fer ætlanin at viðgera, hvussu Føroyar styrkja sín leiklut í Arktiska Ráðnum og øðrum viðkomandi millumlanda samstarvi um Arktis. Arbeiðið er skipað sum samstarv millum serfrøði í almenna geiranum, vinnulívinum og granskingarumhvørvinum. Sum liður í útgreiningini verður eisini skipað fyri kjakfundum og tiltøkum, har serfrøðingar, granskarar og vinnulívsfólk geva sítt íkast. Verkstovan í dag er dømi um slíkt tiltak. Tey trý høvuðsevnini eru sjóvinna, oljuvinna og tænastuvinnur. Endamálið við verkstovuni er fyrst og fremst at leggja upp til orðaskifti um, hvussu vinnulívið á best hugsandi hátt loftar nýggju møguleikunum í Arktis. Eg gleði meg at hoyra, hvat fer at spyrjast burturúr degnum í dag. Eg eri spentur at hoyra, hvørji øki tit halda, at Føroyar eru og kunnu gerast mest kappingarførar á. Og hvat skal til frá okkara síðu. Eg eri sannførdur um, at Føroyar og vit føroyingar hava nógvar dygdir at bjóða fram nú og í komandi tíðum. Saman eiga vit stóra og holla vitan um øll hugsandi viðurskifti í bæði Arktis og í Norðuratlantshavi. Vit eiga eisini áræði, sum skal til. Tað hava vit prógvað bæði fyrr og nú. Sum løgmaður er tað mín fremsta uppgáva at tryggja best hugsandi karmar fyri okkara framtíð. Her eru vitan og samskifti lyklaorð. Vónandi kann verkstovan í dag verða við til at seta út í kortið, hvussu vit gagnnýta nýggju møguleikarnar, so hesir vera gjørdir til vinning fyri okkara land. Takk fyri!"